# TEIR BLIVU VINIR EINA **ÓDNARNÁTT**

TAÐ ERU TEY MEST LØGNU VIÐURSKIFTINI, IÐ SKAPA EITT **VINALAG**. EIN **ÓDNARNÁTT** Í **SAKSUNARDALI** KANN FØRA SO MANGT VIÐ SÆR, – Í HESUM FØRI EITT 27 ÁRA GAMALT VINALAG MILLUM TVEIR TÝSKAR **BRØÐUR** OG EIN FØROYSKAN STUTTLEIKAFISKARA. Í HESUM MÁNAÐINUM VÓRU TEIR BÁÐIR **TÝSKARARNIR** ENN EINAFERÐ Í FØROYUM - FYRI AT **FISKA** SJÁLVANDI, OG FYRI AT STYRKJA **VINALAGIÐ** VIÐ EITT FØROYSKT HEIM

MYND: JENS KRISTIAN VANG



**LAKSAVEIÐA**

Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo

– Tað ljóðar kanska løgið, men tað at fiska er ikki alt. Nei, hjá okkum er tað vinalagið sum telur allarmest, siga teir tríggir stuttleikafiskararnir.

Teir tríggir eru týsku brøðurnir við eftirnavninum Schowerus - tann 71 ára gamli Hilko og tann 73 ára gamli Evert - og klaksvíkingurin, Josias Jacobsen. Teir kunnu allir skriva undir uppá,

> *Við lummalyktini kundi eg skjótt staðfesta, at støðan var alt annað enn góð. Alt fleyt í tjaldinum og teir báðir vóru í villareiði. Her stóð illa til*

at teir ongar ætlanir hava at gloyma tær gomlu gøturnar ella tað gamla vinalagið.

– Nei, vit hava hildið sambandið viðlíka øll hesi árini. Tað hevur givið okkum øllum sera nógv, sigur Josias Jacobsen.

Aftur í ár løgdu teir báðir leiðina til Føroyar og tey kendu laksastøðini kring oyggjarnar. Teir vóru ein morgun í farnu viku við Leynavatn og fiskaðu, tá Sosialurin hitti teir á máli.

Hóast úrtøkan ikki altíð er tann stóra, tá lagt verður til brots við tráðuni og fluguni, hevur tað minni, fyri ikki at siga einki at siga: Vinalagið millum teir og Josias, og allar hinar stuttleikafiskararnar, – TAÐ hevur alt at siga.

– Ja, tað er so stuttligt, tí ein hittir allatíðina nýggj fólk sum hava sama áhuga sum vit. Og soleiðis eru vit komnir at kenna ein hóp av øðrum stuttleikafiskarum, siga teir báðir Hilko og Evert við ein munn.

### Her má eg fara

Vinalagið millum Josias og týsku vinmenn hansara hevur eina langa og



MYND: JENS KRISTIAN VANG

*Tað krevur tol, tol og uppaftur meiri tol, tá ein er stuttleikafiskari. Av og á bítur ein laksur ella eitt síl á, og er tað nóg mikið úrslit av øllum tolinum. Her við Leynavatn er altíð ein møguleiki at fáa fong*